UTTAN ÚR HEIMI

## Sosialdemokratar á veg aftur

Nógv bendir á, at sosialdemokratiski flokkurin í Niðurlondum fer at fáa eitt gott úrslit á valinum í dag.

Flokkurin noyddist at lata valdið frá sær í mai í fjør, tá tað eydnaðist høgramanninum Pim Fortuyn at vísa á, at sosialdemokratarnir høvdu mist sambandið við teir niðurlendsku veljararnar. Flokkurin hjá Fortuyn fekk dygga undirtøku, men sjálvur varð hann myrdur. Nú vísa veljarakanningar, at fólk aftur eru til reiðar at styðja sosialdemokratarnar.

Mánadagin kunngjørdi floksformaðurin, Wouter Bos, at vinna sosialdemokratarnir stjórnarvaldið aftur, skal borgarstjórin í Amsterdam, Job Cohen, leiða stjórnina. Hann hevur gingið undan í teimum sosialdemokratisku royndunum at forða einari meiri víðgongdari lóg, sum skal avmarka rættindini hjá fremmandum at koma til Niðurlond.

## Valdu diplomat úr Libya

Hóast hvøss mótmæli úr USA er ein libyskur diplomatur valdur til formann í mannarættindanevndini hjá ST.

Vanliga verður formaðurin í mannarættindanevndini tilnevndur, men hesaferð var neyðugt við beinleiðis atkvøðugreiðslu, og tað er ongantíð hent, síðani nevndin varð skipað fyri 56 árum síðani. USA var harðliga ímóti at lata ein mann úr Libya fáa formanssessin, men tá atkvøtt varð, fekk tann libyski diplomaturin 33 atkvøður, 17 lond atkvøddu ikki, og trý lond atkvøddu ímóti. Eitt teirra var USA.

Formansskapurin í mannarættindanevndini gongur upp á skift millum teir 5 heimspartarnar, og hesaferð átti Afrika tørn. Tann nýskipaði afrikanski eindarfelagsskapurin samtykti herfyri, at Libya skuldi umboða heimspartin næstu tvey árini.

## Klippfiskurin svíkir

Tað gongst ikki so væl hjá norðmonnum at selja brasiliumonnum klippfisk longur. Í fjør keypti Brasil norskan klippfisk fyri 658 milliónir krónur, og tað var 25 prosent minni enn árið fyri.

Tað var tann tíð, tá klippfiskurin var hátíðarmatur á jólum og á páskum í Brasil, men soleiðis er tað ikki longur. Klippfiskurin er stutt sagt vorðin ov dýrur, og brasiliumenn eru tí farnir at eta annað ístaðin fyri. Tað mesta, sum teir keypa, kemur kortini framvegis úr Noregi. Hildið verður, at tann norski parturin liggur um 90 prosent. Hitt kemur úr Portugal, Íslandi, Kanada og úr USA.

Norski útflutningsumboðsmaðurin í Brasil sigur, at tað er serliga tann minkandi keypiorkan hjá brasiliumonnum, sum er orsøkin til, at teir keypa minni klippfisk. Hann vísir á, at virðið á brasilska gjaldoyranum er fallið so nógv, at nógvar útlendskar vørur eru vorðnar millum 50 og 70 prosent dýrari. Hóast hetta er hent, eru lønirnar í Brasil at kalla óbroyttar.

## Kanna moralin

Tað var Voltaire gamli, sum eina ferð spurdi, um politikkur er annað enn at duga at lúgva í teirri røttu løtuni.

Nú hevur týska samveldistingið sett sær fyri at kanna, um hann hevði rætt, og tí hevur tingið sett eina nevnd, sum skal kanna moralin hjá landins politikarum.

Nevndin varð sett, eftir at teir kristiligu demokratarnir royndu at prógva, at sosialdemokratarnir høvdu logið undir valstríðnum seinasta summar, men nú royna aðrir at prógva, at tað gjørdu teir kristiligu demokratarnir eisini. Upprunaliga ætlanin hjá andstøðuni var at avhoyra Gerhard Schrøder, kanslara og Hans Eichel, fíggjarmálaráðharra undan landspartavalinum í Hessen og Niedersachsen 2. februar í teirri vón, at avhoyringarnar kundu ávirka valúrslitið, men í síðstu viku eydnaðist tað stjórnarflokkunum at fáa avhoyringarnar útsettar til aftan á valið.

# Serdeild skal beina fyri Saddam Hussein

**USA hevur mannað eina serdeild, sum hevur fingið eina uppgávu, brestur kríggj á við Irak. Deildin skal finna og beina fyri Saddam Hussein.**

IRAK.-KREPPAN
*Árni Joensen:*

Fleiri amerikanskir fregnartænastumenn eru longu í Irak, har teir halda eygað við hermannaflutningi, ráðharrunum og ikki minst forsetanum, Saddam Hussein, skrivar blaðið USA Today.

Men uppgáva teirra er ikki heilt einføld. Fleiri serfrøðingar vilja vera við, at irakski forsetin hevur sokallaðar dupultgangarar, og at tað eru bara nøkur fá, sum vita, hvør tann veruligi Saddam Hussein er.

Sambært USA Today eru umleið 100 servandir njósnarar og einir 60 menn hjá CIA í Irak. Umframt at halda eygað við forsetanum og ráðharrunum skulu teir eygleiða støðirnar hjá kollveltingarhirðini, sum verður mett at vera tann best vanda deildin hjá irakska herinum og lívverja hjá forsetanum.

Eygleiðarar í USA siga, at tað er neyvan av tilvild, at tíðindini um teir servandu njósnararnar leka út júst nú. Víst verður á, at amerikanska trýstið á Irak veksur dag frá degi, og at einir 100.000 amerikanskir hermenn eru í økinum við Persaflógvan. Samstundis hevur Bretland gjørt av at senda 35.000 hermenn hagar.

Tað hevur eisini víst seg, at ósemja er í ST-trygdarráðnunum Irak-kreppuna, nú nakrir fáir dagar eru eftir, til vápnaeftirlitsmenninir skulu lata trygdarráðnum sína fyrstu frágreiðing.

Nógv halda, at amerikanarar fara at nýta frágreiðingina sum grundgeving fyri at leypa á, men so seint sum í gjár gjørdu Frakland og Týskland greitt, at tey eru ímóti kríggi við Irak. Bæði londini eru limir í trygdarráðnum, og Frakland hevur harafturat sýtingarrætt har.

Týski uttanríkisráð-harrin, Joschka Fischer, vil vera við, at at álop á stýrið í Bagdad fer at økja vandan fyri yvirgangsatsóknum, og franski starvsbróður hansara, Dominique de Villepin, sigur, at tað er einki, sum rættvísger eina avgerð um at steðga vápnaeftirlitinum fyri at byrja eitt kríggj.

# Y-orðið verður misnýtt

**– Orðið yvirgangur verður nýtt til at lýsa politiskar mótstøðumenn sum ómenni og at gera lógliga andstøðu ólógliga, sigur ST-aðalskrivarin, Kofi Annan.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*



*Kofi Annan og týski uttanríkisráðharrin, Joschka Fischer. Eins og ST-aðalskrivarin hevur Fischer ávarað um, at eitt álop á Irak fer at økja um vandan fyri yvirgangi.*

Stríðið ímóti altjóða yvirgangi hóttir mannarættindi og demokrati, heldur aðalskrivarin í ST, Kofi Annan.

Í einari røðu í trygdarráðnum segði Annan, at y-orðið, sum hann málbar seg, javnan verður nýtt til at lýsa politiskar mótstøðumenn sum ómenni, at skerja talu- og skrivifrælsið og at gera lógliga andstøðu ólógliga.

Kofi Annan legði afturat, at ofra vit frælsið og rættartrygdina, ella lata vit yvirgangin elva til bardaga millum lond, er tað ein størri sigur fyri yvirgangsmenninar enn nøkur yvirgangsatsókn.

Orðini fullu í einari røðu, sum hann helt fyri uttanríkisráðharrunum úr 13 londum, teirra millum USA, Kina, Bretlandi og Týsklandi.

# Leggur deyðarevsing fyri altjóða dómstól

**Stjórnin í Meksiko hevur gjørt av at fara til altjóða mannarættindadómstólin í Haag fyri at forða fyri, at fleiri meksikanar verða avrættaðir í USA.**

DEYÐAREVSING
*Árni Joensen:*

Meksikanska stjórnin vísir í sínum grundgevingum á, at amerikansku myndugleikarnir hava sýtt fyri at lata 54 meksikanskar fangar fáa hjálp frá meksikanskum ráðgevum. Tað er brot á Wiensáttmálan frá 1963.

Bæði Meksiko og USA skrivaðu undir sáttmálan longu í 1963. Sáttmálin áleggur millum annað londum at kunna fangar um, at teir hava rætt til ráðgevarastuðul. Tað hava amerikanarar ikki gjørt, sigur meksikanska stjórnin.

Meksiko hevur fleiri ferðir kært seg um, at USA nýtir deyðarevsing. Tað sama hava lond í Evropa gjørt, og amerikanska deyðarevsingin verður dúgliga umrødd í sjálvum USA, eftir at fyrrverandi guvernørurin í statinum Illinois ógildaði 167 deyðadómar herfyri.

Teir 54 meksikanararnir, sum eru dømdir til deyða í USA, og sum sita og bíða eftir at verða avrættaðir, og nú vil Meksiko hava USA at bíða við at fullføra deyðadómarnar, til mannarættindadómstólurin hevur tikið støðu til málið.



# Góður fjølmiðlasiður nógv saknaður



*Pressan skal hava sítt. Ein lóg um góðan fjølmiðlasið er ein fyrimunur, bæði fyri pressuna og borgaran, heldur Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum*

**Akuttur tørvur er á einari lóg um góðan fjølmiðlasið, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður. Ein lóg hevði skapað størri sjálvjustits heldur løgmálaráðharrin, sum hevur eitt uppskot klárt, ið bara bíðar eftir, at málsøkið verður yvirtikið**

FJØLMIÐLAR
*Ingi Rasmussen*

Arbeitt verður við at yvirtaka málsøkið fjølmiðlar, og fyrr enn tað er avgreitt, kemur ongin lóg um fjølmiðlaábyrgd fyri løgtingið. Tað arbeiðið er tó komið væl áleiðis, og væntandi verður málið avgreitt nakað skjótt.

Tað sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, sum hevur yvirtøkuna og lógarsmíðið av einari fjølmiðlaábyrgdarlóg um hendi.

Løgtingsins umboðsmaður gav ilt av sær í Sosialinum í gjár. Í sambandi við fleiri mál, har føroyskir fjølmiðlar hava staðið fyri skotum í seinastuni, eftirlýsir hann eina fjølmiðlaábyrgdarlóg, sum ásetir, hvussu pressan arbeiðir, og hvussu borgarin verður vardur.

### Púra samdur

– Eg eri púra samdur við umboðsmannin. Tað líkist ongum, at vit ikki hava fingið hetta upp á pláss, men tað liggja orsøkir undir, sum ikki eru í okkara hondum. Vit vóna at fáa hetta upp á pláss innan heilt stutta tíð, sigur Høgni Hoydal.

Fjølmiðlaábyrgdarlógin hevur verið leingi ávegis. Líka síðan 1992 hevur tað ligið á landsstýrisborðinum. Men av ymsum orsøkum hevur tað gingið stiltíð hjá skiftandi stýrum at avgreiða málið.

Í 2000 legði Høgni Hoydal eitt liðugt uppskot fyri tingið, men av tí at Løgtingsskrivstovan segði, at málið kravdi góðkenning úr Danmark, tók landsstýrið málið aftur. Landsstýrismaðurin sendi ein fyrispurning til Danmarkar, men sigur seg ongantíð hava hoyrt nakað aftur.

### Akutt mál

Síðan hevur onki verið at hoyrt alment um málið. Men tað er ikki, tí at landsstýrismaðurin er givin at arbeiða við málinum.

– Hetta er eitt mál, sum eg haldi vera ógvuliga akutt, tí eg haldi tað hava stóran týdning, at vit fáa eina fjølmiðlasiðvenju, ið byggir á sama prinsipp sum í okkara grannalondum, sigur Høgni Hoydal, sum sigur málið vera á dagsskránni hvørja viku.

Javnan verður funnist at fjølmiðlunum, tí teir ganga fólkum ov nær ella eru ósakligir. Sum er, hevur borgarin onga staðni at fara við eini kæru, um hann heldur seg vera fyri órætti í privatu miðlunum. Harafturat kemur, at lógin um kringvarp vísir til fjølmiðlaábyrgdarlógina, sum als ikki er til. Hetta er eitt svínarí, sum myndugleikarnir eiga at fáa í rættlag, sigur umboðsmaðurin, sum bara kann vera kærumøguleiki, tá talan er um almennu miðlarnar. Hann hveppir seg kortini við at taka slík mál upp, tí hann ikki er sakkunnleiki á økinum.

### Jøvn umboðan

Í uppskotinum til lóg um góðan fjølmiðlasið verður ein fjølmiðlaetisk nevnd umrødd, sum hevur javna umboðan fyri almenningin og pressuna. Fólk, ið halda seg vera illa viðfarin í fjølmiðlunum, kunnu so kæra til hesa nevndina, sum eisini hevur møguleikan at taka mál upp av sínum eintingum.

– Lógin hevur stóran týdning, bæði fyri borgaran og ikki minst fyri pressuna sjálva. Tað hevur týdning at fáa skipað viðurskifti kring kærur um fjølmiðlar, so tað fæst ein sjálvjustits, sum er alneyðug í pressuni, sigur Høgni Hoydal.

Spurdur, um tað ikki hevði borið til at sett donsku lógina um fjølmiðlaábyrgd í gildi, til málsøkið var yvirtikið, svarar Høgni Hoydal, at tað hevði ikki tikið styttri tíð og hevði heldur ikki loyst trupulleikan við, hvør skuldi fíggjað fjølmiðlaetisku nevndina.

Nær málsøkið verður yvirtikið og ein lóg kemur í gildi, dugir landsstýrismaðurin ikki at siga. Bara at tað verður sum skjótast.

# Føroysk genta kærir neyðtøku

**Vikugamli dómurin í neyðtøkumálinum móti einari føroyskari gentu í Keypmannahavn er nú kærdur inn fyri landsrættin**

NEYÐTØKA
*Ingi Rasmussen*

Tað vakti stóran ans, tá fimm mans vóru fríkendir í býarrættinum í Keypmannahavn fyri at hava neyðtikið eina føroyska gentu.

Nú kærir ríkisákærin málið inn fyri Eystara landsrætt. Tá málið var fyri í rættinum, fríkendu tveir dómarar menninar, men tann triði dómarin helt talan vera um neyðtøku.

Varastatsadvokaturin sigur sambært Útvarpi Føroya, at hann roknar við, at landsrætturin kemur til eina aðra niðurstøðu enn býarrætturin, og at landsrætturin fer at hyggja øðrvísi at prógvunum.

Teir fimm menninir vóru ákærdir fyri at hava neyðtikið ta tá 25-ára gomlu gentuna í eini jólaveitslu í 2001. Hon greiddi rættinum frá, at hon var boðin innar, men seinni drigin útum, har hon var neyðtikin av fleiri monnum í bakgarðinum. Løgreglan fann teknisk prógv móti fimm teirra, men tveir av dómarunum hildu kortini, at talan ikki var um neyðtøku. Tað helt tann triði dómarin kortini, og ta býtið væntar ákærin verður broytt í landsrættinum.

Málið hevur elvt til kjak um neyðtøku í Danmark, og fleiri hava ført fram, at kvinnur eru ov illa vardar í lóggávuni ímóti ágangi.

# Neyðtøkumenn aftur í rættinum

**Tað er ikki meira enn ein vika síðan, at fimm mans frá einari handverkarafyritøku vóru fríkendir í býrættinum fyri at hava neyðtikið eina føroyska gentu. Nú standa fleiri teirra aftur í rættinum fyri hópneyðtøku av einari aðrari gentu**

NEYÐTØKA
*Ingi Rasmussen*

Hesaferð snýr tað seg um eina grova hópneyðtøku, sum fór fram í Silkeborg í september 2001 ímóti einari bert 15-ára gamlari gentu. Og málið hevur fleiri líkleikar við tilburðin, tá ein føroysk genta segði seg vera neyðtikna.

Munurin er kortini, at tann tá 25-ára gamla føroyska gentan beinanvegin meldaði tilburðin. Tað gjørdi tann 15-ára gamla í Silkeborg ikki. Harafturat kemur, at tann 15 ára gamla hevði gingið saman við einum av monnunum í eina viku áðrenn, hon sigur seg vera neyðtikna.

Gentan helt tætt um hendingina í fýra mánaðir, áðrenn hon tordi at melda tilburðin. Vinkona hennara fortaldi sínum foreldrum um hendingina, og so fór málið á rull.

Tá málið við tí føroysku gentuni var fyri í rættinum, vóru teknisk prógv partur av málinum. Av tí, at tað gekk so long tíð, áðrenn tann 15-ára gamla loksins meldaði, eru ongin prógv, og tí byggir málið bara á vitnisførslu.

Talan er bara um trý vitni: Gentuna sjálva, hennara vinkonu og ein vinmann hjá teimum ákærdu. Vinmaðurin hevur eins og teir ákærdu fortalt løgregluni, at gentan sjálv vildi, men tað afturvísa bæði gentan og hennara vinkona.

Rætturin í Silkeborg hevur sett tveir dagar av til málið. Føroyska gentan fer víðari til landsrættin við sínum máli, og ríkisákærin væntar, at har fær hon viðhald.